

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 06 - 2012

# Statoil givið í Irak

Statoil hevur selt russiska oljufelagnum Lukoil sín part av West Qurna 2-oljuleiðini í Irak, og nú teir iraksku myndugleikarnir hava góðkent handilin, hevur Statoil einki virksemi í Irak longur. Statoil hevur arbeitt saman við Lukoil í West Qurna 2-verkætlanini, síðani leiðin varð boðin út í 2009. Undan handlinum átti russiska felagið 56,25 prosent av loyvinum, og Statoil átti 18,75 prosent. Tey írestandi 25 prosentini eigur irakska felagið North Oil Company. Irak framleiðir umleið tríggjar milliónir tunnur av olju um dagin, og av hesum verða tvær milliónir tunnur fluttar av landinum. Myndugleikarnir hava set sær sum mál, at framleiðslan skal veksa eina hálva millión tunnur í hesum árinum.